LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

FORD SIERRA 1988 TIL SØLU
Øll boð yvir 1500 kr. hava áhuga.
Tlf. 214530

TIL SØLU
Campingvognur í góðum standi, við nýggjum fortelti. Prísur kr 23.000,-
Tlf. 424199

TIL SØLU
Ford Sierra 1988 til sølu. Øll boð yvir 1500 kr. hava áhuga.
Tlf. 214530

CITROEN XSARA
Citroen Xsara 1.9 TD st.car til sølu, árg. 99, 127.000 km
Tlf. 282511

MAZDA B2200
til sølu sum eykalutir.
Tlf. 217716, Klaksvík

VW TRANSPORTER TIL SØLU
árg. 1987, nýsýnaður, skift bremsuskivur og bremsurør framman.
Tlf. 313797/503797

TIL SØLU
Toyota Carina E 1.6 XLI, árg. 1993, í sera góðum standi, sýnaður í januar í ár, ongan kross.
Tlf. 422612

TIL SØLU
Myrkareyður »Hyundai Pony« 1.5, árg. 95, í góðum standi til sølu fyri 18.000,- kr.
Tlf. 312219/508907

BILUR TIL SØLU
Hyundai H1 vørubilur árg. 2000, km 89.500. Í góðum standi til sølu.
Tlf. 314175

PEUGEOT 206 2.0 GTI
spoylarasett, 17" felgur, CD v/ MP3, farvu sum skiftir lit, senkningssett fylgir við (50 mm) til sølu.
Tlf. 229509

NÝSÝNAÐUR SUZUKI ALTO
árg. 99, koyrt 56.000 km, bíliga til sølu.
Tlf. 503004

NISSAN MICRA
sera góður bilur, til sølu.
Áhugað ring 509800

GER KVETTI - SERA BÍLIGT
Av serligum orsøkum skal mín Mazda 323 1.6 bensin frá 03.03. seljast sum skjótast og tí selji eg hann við 15-20.000 kr. í avslátri av tí hann er verdur.
Tlf. 250118/310055

KIA SEPHIA VIÐ SKAÐA TIL SØLU
Vælhildin Kia Sephia 1.5 SLX, árg. 1997, við stórum skaða til sølu fyri bert kr. 5.000,- Bilurin stendur hjá Berg Motors.
Tlf. 227656/210600

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 ferðir
(set X) undir teiginum:

- ❑ Akfør
- ❑ Barnaansing
- ❑ Bingo
- ❑ Býli
- ❑ Dýr
- ❑ Innbúgv
- ❑ Matur
- ❑ Súklur
- ❑ Út-& sjónvarp
- ❑ Amboð
- ❑ Barnaútgerð
- ❑ Brævaskifti
- ❑ Bøkur
- ❑ Fundir
- ❑ Lutaseðlar
- ❑ Pløgg
- ❑ Teldur
- ❑ Ymiskt
- ❑ Arbeiði
- ❑ Bátaútgerð
- ❑ Burturm./funnið
- ❑ Dansur
- ❑ Húsarhaldstól
- ❑ Leikur
- ❑ Samband
- ❑ Tónleikur
- ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰ dagin fyri útgávudagin, t.v.s. at lýsing til mánadagsblaðið skal vera okkum í hendi fríggjadag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.
Sosialurin tekur ongan ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

Alt til akfør

PÍKADEKK TIL SØLU
4 Píkadekk á felgum stødd 185/65-R14 hava ver:i á einum FordFokus
Tlf. 217118

PÍKADEKK YNSKJAST
Píkadekk á felgum stødd 195/70 R15.
tlf. 503249

STÁLFELGUR
4stk 13 felgur sum m.a. passa til Ford Escord til sølu.
Tlf. 543052

PÍKADEKK TIL SØLU
4 píkadekk á felgum (185/65) til VW Passat til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 217224

PÍKADEKK YNSKJAST
4 píkadekk á felgum til Mazda 626 til sølu fyri 1.800 kr. Bert brúkt 1 vetur.
Tlf. 319810 eftir kl. 18.00

NÝGGJ PÍKADEKK Á FELGUM
Stødd 155/70R13. Passa til Peugeot og Ford Escort.
Tlf. 220520

STÁLFELGUR
Fýra 14" stálfelgur til Ford Escort árg. 99 til sølu.
Tlf. 444279/261379

PÌKADEKK
4 Bridgestone píkadekk, 185/14, til sølu fyri 900 kr.
Tlf. 219075

4 PÍKADEKK
á org. felgum til Volvo S40, til sølu vegna keyp av nýggjum bili. Prísur 2.000,- kr. Dekkini eru keypt seinast í nov. 2004.
Tlf. 319858/210198

17" FELGUR
nýggjar við góðum dekkum, við 5 holum, passar til BMW. Prísur 5.000,-
Tlf. 221162

HEILÁRSDEKK TIL SØLU
4 góð heilársdekk til sølu fyri 1200 kr. Lítið brúkt. Stødd 185/65-15.
Tlf. 224925 eftir kl. 17.30

TIL SØLU
4 alufelgur og 4 felgur við orginalum skálum til Citroen Xsara, árg. 2001.
Tlf. 268528

TIL SØLU
Alufelgur til »Mazda 326« og ein harrasúkkla bíliga til sølu.
Tlf. 311199

DEILIR TIL SØLU
Deilir til Mazda 626, árg. 92/97, bíliga til sølu.
Tlf. 226689

Amboð

BLANDIMASKINA
Alko, fæst við at heintast.
Tlf. 319310

Arbeiði

AU-PAIR
Islandsk/schweizisk musikfamilie i Tyskland med 2 børn søger au-pair hurtigst mulig. Opholdstid i det mindste til slutten af juli 2006. Alder min. 19 år, selvstendig, fortrolig, ikke-ryger. Gratis sprogkursus.
Tlf. 0049 2205 907102, gerdur@puntin.de

JÓLAHJÁLP TIL SKRADDARA
Søkt verður eftir einum fólki nakrar tímar um dagin til ymiskt seymiarbeiði, at byrja beinanvegin og fyribils fram til jóla. Royndir innan vanliar klædnaumvælingar so sum upplegging og líkandi er eitt krav. Beinta Vilhelsen, skraddari
Tlf. 319796 ella 210796

ARBEIÐI YNSKIST
25 ára gamal havnarmaður ynskir arbeiði, alt h evur áhuga. Havi koyrikort til persónbil og trukk. Vinarliga ring
tlf. 509309/317109

SØKT VERÐUR EFTIR
handaligum manni at umvæla altan, og at mála loft. Tlf. 504370, 0045 61703990,
rent4me@sol.dk

Barnaútgerð

BARNAVOGNUR YNSKIST TIL KEYPS
Vælviðfarin barnavognur við lyft ynskist til keyps fyri sámuligan prís. Hann má vera lættur, kunna leggjast saman og handtakið skal kunna stillast í ymiskar hæddir. Skal max. vera nýttur til 2 børn.
Vinarliga ring 257176

TVÍBURAVOGNUR TIL SØLU
Simo Bertini kombivognur við 2 liftum til sølu.
Tlf. 314644, eftir kl. 17

YNSKIST TIL KEYPS
Føroyskur koyriposi til vogn ella stól ynskist til keyps fyri ein sámuligan prís.
Tlf. 441503/262062

TVÍBURAVOGNUR
Ein góður klapvognur til tvíburar bíliga til sølu.
Tlf. 314545

BILSTÓLUR BÍLIGA TIL SØLU
Britax Römer bilstólur 9-18 kg. einans 200 kr. Britax Rock-A-Tot upp til 13 kg. einans 300 kr.
Tlf. 521694

TIL SØLU
Svartur Odder koyristólur 2400 kr. Mothercare klapvognur 500 kr.
Tlf. 457697 ella 217697

KOYRISTÓLUR TIL SØLU
Brio koyristólur til sølu fyri kr. 1.200,-
Tlf. 319310 eftir kl. 17

GÓÐ BARNASONG
70x170 cm við magasin og madrassu, lítið brúkt.
Tlf. 254266/422612

BARNASTÓLUR YNSKIST TIL KEYPS
Hokus Pokus barnastólur ynskist til keyps.
Tlf. 442036

Bátaútgerð

TIL SØLU
Føroyskt 10-mannafar við fiskiloyvi til sølu.
Tlf. 214762

BÁTUR TIL SØLU
merki Gásni 850.
Tlf. 226732

LÍNUSPÆL TIL SØLU
Eitt rustfrítt línuspæl til sølu.
Tlf. 313976/260560

Bingo

GOTT BINGO
verður í Stórhúshøll sunnudagin 20. nov. kl. 16.00. At vinna verður m.a. eitt før. krov, gávukort á 1.000,- kr.
ÌF fótbóltur

BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum hósdagin 24. nov. kl. 19.00. 6.-12. spæl gávukort á 500,- À lutaseðli m.a. karamellur, døgurðamatur, 2xgávukort á 500,- 1x1.000,- bingola, eykaspæl, koyring heim.
Argja Róðrarfelag

FRÁ TÓRSHØLL
Gott bingo verður leygardagin 19. nov. kl. 19.00, m.a. at vinna er kjøt, gávukort, karamellur, ræst krov. Eisini vera eykaspælini spæld. Øll eru vælkomin.
Tórshøll

STÓRT TILTAK
verður í Róðrarneystinum á Argjum leygardagin 19. november klokkan 15.00. Mat- og bommtombola og kaffisøla. Søla av lutaseðlum, at vinna verður sodavatnskassar, karamellur og 2 føroysk krov. Øll eru hjartaliga vælkomin.
AB-stuðlar

Burturm. /funnið

CITIZEN UR BURTURMIST
møguliga á lei:ini SMS/Lutzenstrød. Skivan er fýrakanta við metalleinkju.
Tlf. 317236 ella 276058

EFTIR MØTINI SUNNUDAGIN
6. november í Ìtróttarhøllini á Hálsi, tók eg skeivan jakka. Í mínum jakka lógu lyklar í lummanum, ið eg fegin vildi fingið aftur. Tú ið fekst mín jakka, vinarliga ring til
tlf. 515097

BURTURMIST
Harrasilvurarmband við navni, burturmist leygarkvøldið 8. okt. Um nakar hevur funngið tað, vinarliga ring
Tlf. 252623

Býli í Føroyum

ÍBÚÐ Í HAVN
Stór íbúð í Havn, køk, stova, bad/wc og 2 kømur leiga 5000 kr uttan el oghita, 2 mdr dep.
Skriva: ibuditorshavn@yahoo.dk

KAMAR TIL LEIGU
liggur miðskeiðis í Havn. Køkur, hjallur, stovur, tvey baðiverilsir at deila við 3 onnur. Atgongd til allar vanligar hentleikar. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 2215/6

ÌBÙÐ TIL LEIGU
Liggur miðskeiðis í Havn. Stova, kamar, køkur, baðirúm. Atgongd til vaskimaskinu og hjall. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 2215/5

ÍBÚÐ YNSKIST Ì HAVN
Ein lítil íbúð til leigu fyri 3.300 kr. við ljós og hita. 1 mðr. dep.
Tlf. 310017/218585

TILKOMIN TRÚGVANDI KVINNA
søkir íbúð í Havn. Má hava 2 kømur. Havi 1 barn. 4.-5.000 kr./mðr. við ljósi og hita.
Tlf. 580740

STÓR ÍBÚÐ
í vesturbýnum í Havn til leigu frá 1. januar. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 2215/2

ÍBÚÐ YNSKIST Ì HAVN
Vit eru eitt par, ið ynskja eina íbúð í Havnini. Vit eru friðalig fólk, ið fara væl um og sum gjalda til tíðina. Um tú kann hjálpa okkum, so vinarliga ring
421270/226689

HÚS Í HAVN TIL LEIGU
85 fermetrar í miðbýnum. Frá 1. des. til summarið 2008. Prísur 5.500 kr. um mánaðin u/ ljós og hita. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 2213/9

HÚS/ÍBÚÐ Í SUNDALAGNUM
Vit sóknast eftir húsum/íbúð til leigu í Sundalagnum skjótast tilber, alt hevur áhuga. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 2213/7

ÌBÙÐ TIL LEIGU
miðskeiðis í Havn. Stødd uml. 80 fermetrar, kostnaður 4.500,- um mðr. umframt el og olju. Avsláttur kann latast mótvegis at ymiskt viðlíkahaldsarbeiði verður gjørt. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 2213/2

ÌBÙÐ TIL LEIGU Ì HAVN
til friðalig ikki-roykjandi persónar. rent4me@sol.dk
Tlf. 504370, 0045 61703990,

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Einstaklingaíbúð 50 fermetrar, til leigu fyri 4.500,- pr. mðr. við ljós og varma. Dep. krevst.
Tlf. 224651

HØLI Í TÓRSHAVN TIL LEIGU
stødd uml. 170 fermetrar, hædd 3 m. 1 portur 3x2,75 m. Varmi er inni. Hølini eru spildurnýggj og liggja sera væl fyri. Vælegnaði til goymslu o.a.
Tlf. 284300

SETHÚS Í NORÐRAGØTU
til leigu.
Tlf. 224757 eftir kl. 17

HÚS Í HVALBA
til leigu.
Tlf. 215142/212554

VIT ERU EITT UNGT PAR
ið ynskja eina íbúð í Havn skjótast gjørligt. Fara væl um, roykja ikki og gjalda til tíðina.
Tlf. 260042

KAMAR TIL LEIGU
í Hornabø, við egnari inngongd, atgongd til køk, bað og vaskimaskinu. 1600 kr. um mðr.
Tlf. 317507

HÙS TIL LEIGU
Hús í Lágabø í Vági til leigu.
Tlf. 0045 75128080

ELDRI HÚS
á Glyvrum til leigu.
Tlf. 220589

Býli uttanlands

ÍBÚÐ TIL LEIGU Í ÅRHUS
ìbúð við tveimum m til framleiðu í Århus frá 1. jan til 31. juli. Liggur í friðaligum umhvørvi tætt við skóg og strond. Verður leiga út partvís møblera.
Ring á tlf 311397 ella 274897

ÍBÚÐ Í HASLEV
til leigu frá 1. februar til 1. juli. 87 fermetrar, 4.500,- við ljós og hita. 1 tíma tok frá Kbh. og 20 min. frá Næstved og Køge. Barnavinarligt umhvørvi.
Tlf. 504429

Dansur

DANSISTOVUGAMAN
Dansurin sunnukvøldið 20. nov. er avlýstur. Dansað verður aftur sum vant sunnukvøldið 27. nov. frá kl. 20.00 til 22.00.
Nevndin

Dýr

KAT SØGER NY FAMILIE
Voksen hunkat søger ny børnevenlig familie. Katten er børnevenlig og steriliseret. Div. udstyr medfølger.
Tlf. 541416

2 SERA FITTIR HUNDAHVØLPAR
Kunnu latast beinanvegin. Vera ikki so stórir. Hava fingið ormakur.
Tlf. 265624 ella 270692

KANINUNGAR
3 fittir kaninungar til sølu.
Tlf. 318570